DAGSINS MEINING

Fullveldi og vælferð

Í sendingini Sostatt mikukvøldið gjørdi ein lurtari vart við vandan fyri vælferðini, nú fylgjurnar av fullveldistilgongdini av álvara gerast sjónligar. Landsstýrismaðurin í heilsu- og familjumálum vissaði lurtaran um, at eingin vandi var á ferð í so máta. Ein hevði støðugt havt í huga, at fullveldistilgongdin á ongan hátt skuldi nerav vælferð føroyinga.

Men sendingin sum heild prógvaði tað mótsetta! Hóast allar møguligar sjóforklæringar, so kundi landsstýrismaðuirn ikki burturforklára tann beiska veruleika, at orsøkin til alla neyðina við at senda sjúklingar á Ríkisskjúkrahúsið stavar frá troti á gjaldføri. Í blaðnum her í gjár greiddi ein fyrrverandi gjaldstovustjóri væl frá, at hetta trot júst stavar frá tí nógv minkaða blokkinum. Blokkurin var ætlaður til at rinda m.a. fyri viðgerð av føroyskum sjúklingum á Ríkisskjúkrahúsinum! Men nú eru farnar 366 milliónir út úr almenna gjaldførinum orsakað av blokkniðurskurðinum. Hartil eru komnar nýggjar útreiðslur av yvirtøkum m.a. skipaeftirliti o.ø. Tað næsta verður fólkakirkjan. Uttan mun til, hvat landsstýrismenn siga, so er veruleikin tann, at minni almennur peningur er til vælferð! Vit síggja tað svart uppá hvítt hvønn dag. Hví vóru annars settar 20 milliónir minni á figgjarlógina í ár enn viðgerðin kostar? Jú, fyri at venja borgarar og samfelag til, at vit fáa minni vælferð í framtíðini, tí minni verður at gera gott við. Tað er tí at lumpa fólk at pátsanda, at fullveldistilgongdin ikki kostar vælferð! Øll gongdin í málinum um viðgerðina á Ríkissjúkrahúsinum prógvar, at tað er beint tvørturímóti, og landsstýrismaðurin átti at skammast yvir sínar jánkasligu royndir at káva út yvir hendan veruleika. Landsstýrismaðurin og samgongan vóru so ruddiliga avdúkað í nevndu sending. Nú bíða vit bert eftir, hvat tað næsta verður, tí vit eru illa nokk byrjað uppá fullveldisgongdina.

Sendingin váttaði tað, sum figgjarlógaruppskotið fyri 2003 er eitt talandi dømi um, nevniliga, at vit ikki fáa endarnar at røkka saman eftir niðurskurðin í blokkinum - at fullveldið beint tvørturímóti givnum lyftum kostar vælferð og tað við lít! Vit hava einki móti eini varisligari minkan av blokkinum. Men vit ávarðaðu ímóti at fara so harðliga fram, at tað fór at kosta vælferð. Men rætt skal nú vera rætt. Formaður Tjóðveldisflokksins segði á sinni við Sosialin, at fullveldið fór ikki at verða nakað paradís. Gongdin í seinastuni, har fylgjurnar av blokkniðurskurðinum nú gerast alt meira sjónligar, gevur honum rætt í, at fullveldið gjørdist einki paradís. Nú er uppá tíðina, at samgongan leggur kortini á borðið og sigur fólkinum frá, hvat alt hetta eksperimentið kemur at kosta føroyingum, og hvat slag av samfelag, fullveldið verður. Eitt er vorðið púra greitt: talan verður ikki um eitt norðurlendskt vælferðarsamfelag.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Lítil viðmerking til Jóhann Mortensen, tíðindaleiðara

Erhard Jacobsen

Trupulleikin er bara, at tit í ÚF blanda tvey ting saman, sum lítið og onki hava við hvørt annað at gera.

Flutningur og koyring í bygdum og býum og millum bygdir er nógv øktur hesi seinastu árini.

Hetta sæst m.a. eisini av, at metøking er í nøgdini av bussum og stór øking í talinum av lastbilum og vøruvognum, samstundis sum talið av persónbilum sjálvandi eisini er økt hesi seinastu árini.

Hetta er eitt úrslit av vælferðini og av, at virksemið í landinum er økt.

Tann nógva koyringin (og ikki spesielt dieselbilarnir!) ger ivaleyst, at nøgdin av CO_2 útláti økist.

Tíbetur hava vanlig fólk ofta valt bíligara háttin at ferðast, nevniliga at keypa dieselbilar.

Lat okkum nú siga, at tey, sum hava keypt sær dieselbil, heldur koyrdu í bensinbilum, so var CO_2 útlátið, um koyringin annars var tann sama, økt uppaftur meira enn tey 54%, sum tú nevnir.

Hví so fara eftir mannínum (honum, sum koyrir í dieselbili), tá ið tit heldur áttu at farið eftir bóltinum.

Tíðindini sunnumorgunin kundu tí ljóða, at tað er ikki óhugsandi at almenni avgjaldspolitikkurin í staðin fyri at økja heldur hevur minkað um CO_2-útlátið. Hetta var tað, eg royndi at greiða tykkum frá. Og hetta er eisini hent, hóast tingmenn herfyri samdust um at seta avgjaldið á bensini niður við stórari upphædd!

Í mini viðmerking royndi eg ikki at dylja, at dieselbilar eins væl og bensinbilar dálka umhvørvið, men tá ið tað snýr seg um CO_2 útlát, og tað var hetta tíðindini hjá tykkum snúðu seg um, dálkar ein dieselbilur vanliga minni enn ein bensinbilur, um støddin annars er tann sama. Og hetta varð eisini váttað í eini samrøðu, sum tit høvdu við eitt FDM-umboð.

Tit í ÚF vita líka væl sum eg, at tað skal eitt "punch" til fyri at fáa lurtaran at vakna.

Tí eru tíðindi mangan so tunn, tá ið saman um kemur. Nógv er óviðkomandi tíðarspilla og ógrundaður panikkur, samstundis sum onnur týðandi mál als ikki verða tikin upp á tungu (kanska tí at umstøður ikki eru til tess).

Eg fari at enda við at siga, at skulu vit ganga eftir tykkara logikki (og kanska eisini logikkinum í kanningini, sum eg ikki havi sæð), so eru tey, sum koyra í bensinbili antin býtt, ella eisini eru tey serliga góð við umhvørvið, tí teimum stendur eisini í boði at keypa sær dieselbil.

Men man tað nú vera so einfalt?

CO_2 útlát í okkara umhvørvi

Álvur Zachariasen

Henda kanning – sum er gjørd viðvíkjandi dálking av umvhrøvinum hjá okkum – er hon álítandi?

Ein kundi hugsað sær, at dálking í okkara umhvørvi stavar ikki bert frá okkum sjálvum, men verður ávirkað uttanfrá.

Hvussu hevur luftrákið verið tá ið henda kanning varð gjørd. Ein sjálvur hevur sæð eitt ógvuliga stórt útlát av CO_2 frá boripallum í »Norðsjónum«. Við tað, tá ið gassið verður brent, er olja íblandað.

Undirritaði hevur rakt við, at eitt einstakt tíðarskeið, er so nógv dálking í Norðsjónum, sum stavar frá boripallum, stór svørt skýggj vóru hangandi í einum rættiliga stórum havumhvørvi, og tá ið logn var, blivu tey ikki blást burtur.

Fyri at koma aftur til umhvørvi hjá okkum viðvíkjandi dálking, so kann tað hugsast, at luftrákið sum kemur frá Norðsjónum, at vit fáa eina rúgvu av tilfari CO_2 harfrá, og ikki bert frá okkum.

Er henda kanning gjørd tá ið luftrákið frá Norðsjónum hevur verið áhaldandi, so er møguligt, at vit fáa eina skeiva mynd hesum viðvíkjandi.

Er kanningin gjørd, har luftrákið er komið norðanfrá, so er ein onnur støða.

Øll vita, at luftrákið norðanfrá er reinari í sær sjálvum, har er lítið og onki útlát av CO_2, fyri at siga ikki onki!

Endaliga, kundi tað verið áhugavert, at fingið at vita, hvussu luftrákið hevur verið, tá ið henda kanning varð gjørd.

Sum sagt, kunnu vit fáa eina skeiva mynd sum bert stavar frá okkara egna umhvørvi, ella er dálkingin ávirkað uttanfrá.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Jón Brian Hvidtfeldt
jonbrian@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

Rullandi redaktionin:
tel. 220507

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-friggjadag klokkan 14^{00}

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mík. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Friggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mík. kl. 15	Mík. kl. 12	Mík. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Søgan um Tobban og steindeyðu samgongu hansara

Johan Dahl
løgtingsmaður

Tað var einaferð ein maður, sum kallaðist Tobbi, ein politikkari av Guðs náði ,ja ein ordans kempa, tá tað kom til tað verbala, til dundurstalur og dundursákærur móti sínum samgongufeløgum.

Eina partur av teimum ungu við lítlum og ongum lívskunnleika, men við ideologiini og dreymunum – tað skal sjálvandi eisini til sum ein partur av okkara lívi - tey sóu upp til hendan Tobban, tá hann framførdi sín sjónleik við harðmæltari talu, sum av og á endaði í galrópum og stórum armsveiggjum og retorikki, sum tilkemur einum rættum statsmanni - republikkin segðist javnan at verða í eygsjón - hon sást í havsbrúnni.

Tað var bara eitt ella kanska tvey problemir í øllum hesum:

Flestu av lyftunum, sum Tobbin og hansara floksfelagar og samgongulimir høvdu givið til teirra "undirsáttar", hildu slettis ikki, - alt sá út til at enda í eini reinari oyðumarkargongd har ongin "Móses" var at leiða tey aftur á røttu kósina - tey vóru vilst burtur frá sínum upprunaligu ætlanum, og kumpassina hevði Tobbin tíverri eisini mist, so skilið var ikki gott.

Hóast teir innanborða í samgonguskútuni høvdu arðar disiplar, sum kundu havt fört teir gjøgnum oyðimørkina inn aftur á røttu kósina, so sá hetta tó heldur ikki út til at eydnast, tí ymisk mál høvdu tikið seg upp, sum ikki vóru væl lýdd av hesum partinum av fýrklevaranum, og tískil var neyvan nøkur hjálp at heinta har.

Tann stóri eindin við tí stóra leiðaranum, „landsfaðirinum", skírdur so, av sínum egnu, - vóru Tobbin og hinir eisini komnir upp at Tobbast við, tí teir høvdu ákært tveir av hægstu monnum innanfloks har fyri at verða røvarar og banditar og óegnaðir at leiða landið.

Hendan ákæran endaði tó, sum so nógv annað sum Tobbin framførdi - eisini í reinum sjónleiki, sum mátti endavent samgonguskútuni með alla og kanska tað, ið verri var.

At neyðugt var at krúpa til krossin og lata "land fly" var ivaleyst sera hart fyri Tobban .,- vit sum vóru áskoðarar tóku synd í Tobbanum , - hetta minti okkum ikki sørt um høgguslokkin, sum í álopið svimur fram við fullari styrki,- goysir sítt blekk á figgindan og bakkar síðani aftur við fullari styrki .

Aftan á hendan sjónleik sum "næstan" oyðilegði Ólavsøkuna hjá "landsfaðirinum" og hansara krúnprinsi, ja so helt kollisions-kursurin áfram hjá samgonguni, ið Tobbin var ein partur og endaði ,- seinast vit vistu, við eini figgjarlógarkladdu (uppskotið), sum var so langt við síðuna av veruleik-anum, at "figgjar –oraklið við tí reyða passinum" í flokki Tobbans, - bæði vildi spara hópin av peningi, samstundis geva skattalættar og fremja stórar ætlanir - skil tað hvør í vil!!!!

Hin parturin í flokkinum hjá "landsfaðirinum" hesum faðiri, sum heldur vildi ganga á fjalli og fletta, fyri at halda mentanina í hevd , enn at verða við til figgjarlógarframløguna, hesin partur var nú við at fara í panikk, tí eitt var klárt - her mátti sparast og tað ikki við mýkindum - ja heilt upp í 200 mio. verður sagt!!!

So skuldu vallyfti heldur halda áfram við at verða brotin lyfti!

Mong mugu ivaleyst spyrja sig sjálvan - hava hesir menn sovið í 4 ár, at teir fyrst vakna nú við kaldan dreym, aftan á 4 ára forbrúksgildið har lønirnar hjá almenna sektorinum eru vaksnar við 440 mio. og rakstrarútreiðslunar tilsamans, undir teirra leiðslu – eru vaksnar við tilsamans 1.123 mio. krónum.

Spennandi verður at vita hvussu kabalin fer at ganga upp.

Á sjónvarpsskíggjanum fyri stuttum segði Tobbin, at andstøðan var so steindeyð!

So vítt eg dugi at síggja, so má verða minni munurin á lógaruppskotum komin í tingið frá andstøu og samgongu - ivaleyst fleiri frá andstøðu, - tá vit ikki rokna eykajáttanaruppskot frá forbrúkssamgonguni við.

Jú, so sanniliga er lív í samgonguni- hundalív hvønn einasta dag - verbalt kríggj og klandur.

Seinasta ið hoyrdist frá Tobbanum og hansara monnum var av Christiansborg, har teir høvdu framløgu og kjak um ríkisfelagskapin og framtíðina - betur hevði verið um teir høvdu havt ein kjakfund á heimavølli, har teir greiddu Føroya fólki frá figgjarlugu støðu Føroya, og hvussu teir ætla fáa kabalina at ganga upp.

Fylgið nú væl við tann næsta mánaðin ella hálvannan, tað verður ivaleyst sera áhugavert at líða á, hvussu leikur ferst.

Øll við serligum tørvi vórðu ikki send á Ríkissjúkrahúsið

Ingibjørg Thomsen

Við hesum vil eg gera eina viðmerking til tíðindini, sum eru komin fram í fjølmiðlunum um, at Heilsuverkið ikki hevur ráð at senda sjúklingar við serligum tørvi á Ríkissjúkrahúsið. Samtíðis sigur Vilhelm Johannesen, løgtingsmaður, at sjálvt í ringastu kreppuni frá 1991-93 vórðu allir sjúklingar við serligum tørvi sendir á Ríkissjúkrahúsið og ikki fyrr enn nú er tað vorðið ein trupulleiki. Til hetta má eg tíverri siga, at tað ikki samsvarar við veruleikan. Vilhelm Johannesen er uttan iva umskiltur, tí hann veit ikki betri.

Sjálv hevði eg tørv á viðgerð á Ríkissjúkrahúsinum, tí specialið ikki var í Føroyum. Árini 1986-90 fekk eg neyðuga viðgerð niðri. Tá eg varð sjúk aftur í 1991, fekk eg at vita, at eg bleiv ikki send á Ríkissjúkrahúsið aftur, tí "eg hevði verið ov kostnaðarmikil fyri Heilsuverkið. Her mátti sparast og tað mátti eisini galda meg." Eg varð skelkað og gloymi ongantíð ta løtuna aftur.

Soleiðis gingu tvey ár, og eg bleiv bara verri og verri og føldi tað vónleyst. Gjørdi so av at flyta til Danmarkar, leitaði upp lækna har og bað um hjálp. Takkað verið teimum er støðan ein heilt onnur í dag næstan 10 ár seinni. Aftaná tvær skurðviðgerðir fekk eg tað nógv betri, men av tí at eg hevði gingið so leingi, høvdu aðrir heilsutrupulleikar stungið seg upp. 5 serlæknar á ymiskum økjum hava síðani fylgt mær og higartil hava viðgerðirnar eyðnast væl. M.a. fekk eg í Danmark staðfest, at eg, nakað áðrenn eg fór niður, hevði havt blóðtøpp í hjartanum, sum ikki var viðgjørdur. Greiddi danska læknanum frá, at eg hevði sent boð eftir lækna, men var hansara niðurstøða, at ikki var neyðugt at leggja meg inn til kanningar. Danski læknin undraðist stórliga á hesa viðferð.

Eftirspælið er, at Ríkissjúkrahúsið má fylgja við heilsustøðuni hjá mær so leingi eg livi, so tað er ikki nøkur løtt søk hjá mær at hugsa um at flyta aftur til Føroya. Soleiðis kann tað eisini gangast føroyskum sjúklingum! Føroyska Heilsuverkið hevur sostatt ikki havt fleiri útreiðslur av mær, men so má eg eisini spyrja - hvørjum tekur Heilsuverkið sær í veruleikanum av? Tað sær ikki út sum tað er fyri øll!

Tað var hart at verða noydd til at rýma av landinum vegna sjúku, fara frá heimi sínum og frá familjuni, men har var einki annað at gera, um eg skuldi gera mær nakra vón um at fáa hjálp. Hjálpina fekk eg á Ríkissjúkrahúsinum uttan nakran almennan føroyskan stuðul yvirhøvur.

Eitt vil eg nevna afturat. Ongantíð hava tey á Ríkissjúkrahúsinum sagt við meg, at eg havi verið teimum ov kostnaðarmikil, hóast eg havi verið innløgd fleiri ferðir. Tað hevur lívgað og uggað meg ótrúligt øll hesi árini at vita, at á Ríkissjúkrahúsinum verður man sum sjúklingur virdur sum menniskja uttan mun til, hvussu kostnaðarmikil einstaka viðgerðin er. Mínar beisku royndir við føroyska Heilsuverkinum siga mær, at hetta tíverri ikki er galdandi fyri føroyska Heilsuverkið.

Andsøgnin

Jónas Johnsson
sjálvstýrismaður

Onnur við mær munnu síggja, at diskriminatiónsparagraffin er diskriminerandi. At hon er í andsøgn, tí hon nevnir ávísar bólkar, men ikki allar. Og tað ber illa til. Øll kunnu í grundreglúni verða fyri mismuni ella happað. Greinin skal sjálvandi vera, men hon átti ikki at nevnt ávísar bólkar. Øll skulu vera á jøvnum føti fyri lógini! Nú stríðast nøkur ónevnd fyri at verða nevnd. Og nýggj kunnu koma afturat við líka góðum ella vánaligum rætti. Og verri er, at nøkur í veruleikanum hava í kvittanum, at nýta hetta sum lopfjøl til komandi krøv, og sum greinin ikki er ætla til, herundir krøv sum happa kristnivirðir. T.d. frælsinum at boða Bibliuna sum autoritet. Vit hoyra fyri tíðina eisini um hvat fyriferst í Bretlandi og Svoríki.

Hóttir bólkar skifta frá tíð til aðra. Skrivið tí ongan bólk undirskilt okkara málburð "eingin nevndur eingin gloymdur". Viðmerkið at greinin ikki er ætla at fremja politisk seráhugamál. Latið okkum so fáa fri á hesum økinum og nýta orkuna til uppbyggandi evnir fyri okkum øll og Føroyar. Vit eru tó samd um at vera ímóti allari happing.

Uttanlands ella heima

Sum eg skilji ráðharran í heilsumálum frá tíðindamiðlunum, vil hann, um hann sær skilagóðar møguleikar, flyta ávísar viðgerðir heim til Føroyar.

Í tí sambandi átti eisini at bori til, at gjørt uppvenjingarstovnar, kurstaðir, til fólk, ið bera álvarslig brek í rørslulagnum. Tó mugu fólk aftaná álvarsligar skaðar / truplar sjúkur framvegis uttanlands til akutta serviðgerð og møguligt framhald. Ekspertisan kemur ikki eftir einum degi. Nøkur velja vegna umstøðurnar at búleikast í Danmark. Men lívið heldur fram í Føroyum fyri tey flestu, aftaná akutta skaðan / sjúkuna!

Samlaða játttanin verður kanska ikki minni við føroyskum almennum kurstøðum, men ráðini betur. Tí ferðing og uppihald minka og pengar fara til fleiri føroysk arbeiðsplpáss. Teir mala í Føroyum og fara aftur í lands- og kommunukassar, heldur enn í Statskassan og danskar kommunir. Verða kurstøðini í topklassa, er kanska ikki heilt ómøguligt, at útlendingar eisini koma higar til kur? Ein visión við perspektivum!

Hvussu nógvar krónir fara av landinum fyri nevnda økið, ferðir og ferðafylgir, veit eg ikki? Men at vit eiga at fáa meira fyri tær her heima, er so sjálvsagt sum at 2 + 2 = 4.

Tað er annars ikki rætt, einans at taka støði í hvussu nógv um árini fóru niður, og hvussu nógv varð nýtt. Fleiri føroyingar fáa als onga ella ikki nøktandi viðgerð júst tí teir skulu av landinum og tí røttu tilboðini mangla heima. Sjálvandi eisini tí pengar altíð vísa seg at vera knappir til slíkt. Øðrvísi er tá tað snýr seg um vegir, tunnlar, skip, løgtingshús, ráðharrastovur, fyrisiting, umsiting, stýrir, nevndir o.a.m. av líknandi slagi. Men tann friski parturin av samfelagnum skal sjálvandi eisini virka væl.